# Føroyskar lógir til arbeiðsmarknaðin

**- Lutfalsliga fá fólk hætta sær undir at stovna egið virki í Danmark og øðrum ES-londum, tí nógvar lógir og reglur køva framtakshugin og fyritakssemið, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag**

LÓGIN OG REGLUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í nýggja bóklinginum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur givið út, ávarðar felagið ímóti, at danskar lógir og ES-arbeiðsmarknaðarlógir fara at mynda okkara arbeiðsmarknað.

- Úrslitið kann gerast, at vit fáa ein líka stirvnan arbeiðsmarknað, sum vit síggja í fleiri av ES-londunum.

### Køva framtakshugin

Felagið vísir á, at lutfalsliga fá fólk hætta sær undir at stovna egið virki í Danmark og øðrum ES-londum, tí nógvar lógir og reglur køva framtakshugin og fyritakssemið.

- Politikarar eiga at hava hetta í huga, tá ið teir seta í gildi arbeiðsmarknaðarlógir - ikki minst, tá ið teir tosa um tørvin á arbeiðsplássum og nýggjum møguleikum úti um landið.

### Umsitingarlig byrða

Felagið sigur, at tey smáu virkini hava snøgt sagt ilt við at lyfta umsitingarligu byrðarnar og fíggjarligu bindingarnar, sum standast av strongu lógarstýringini.

- Tí hongur tað ikki saman, tá ið politikarar bæði tosa um at spjaða arbeiðspláss út um landið og samstundis leggja umsitingarligar fótonglar fyri fólk, sum vilja stovna egið virkið, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag.



*- Tey smáu virkini hava snøgt sagt ilt við at lyfta umsitingarligu byrðarnar og fíggjarligu bindingarnar, sum standast av strangari lógarstýring, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag*

*Mynd: Tilvildarlig*

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 39, 2005
www.kaupthing.fo

# Álitið á evropiska búskapin økist

MARKNAÐARRÁK

Seinastu vikurnar eru álitistølini fyri búskapin í Evropa betraði, og farna vika var einki undantak. Álitistøl verða roknað eftir spurnarblaðskanningum í ávísum bólkum í samfelagnum. Til dømis finnast álitistøl fyri brúkarar, innkeypsstjórar, búskaparfrøðingar og ídnaðarstjórar. Tey flestu av teimum geva góðar ábendingar um, hvønn veg búskapurin flytir seg, upp ella niður. Í seinastuni eru brúkara-, ídnaðar-, vinnu-, og búskaparfrøðingaálitið á evropiska búskapin betraði. Viknandi evran hevur sín part av æruni, men áðrenn ein gerst ovfarakátur av tí, er vert at minnast til, at høgi oljuprísurin bæði minkar um eftirspurningin eftir evropiskum vørum í USA, umframt at hann minkar um nýtsluna í Evropa. Tískil verður ein løta, til vit av røttum gerast bjartskygd um evropiska búskapin.

### Renturnar hækkaðar eitt sindur

10-ára danska lánsbrævarentan hækkaði eitt sindur í farnu viku, frá 3,03% til 3,10%. Við hesum eru renturnar aftur í tí rákleysa umhvørvinum, tær vóru í í summar. Útlit eru fyri rættiliga sveiggjandi lánsbrævarentum hendan mánaðin.

### Jaligt hjá Hennes & Mauritz

Í farnu viku kunngjørdi svenska klædnavirkið Hennes & Mauritz (H&M) sera jaligan roknskap. Meðan sølan hækkaði 18% í 3. ársfjórðingi, hækkaðu inntøkurnar heili 36%. Hetta er størsta hækkingin í meira enn tvey ár og stendst av, at H&M hevur veitt færri avsláttrar og at tað hevur verið bíligari at keypt klædnavørur úr Kina. Síðani roknskapin er H&M hækkað góð 3%. Samstundis eru norðurlond í miðal hækkaði 0,5%. Vit meta at áhugavert er at keypa H&M til eina langtíðar íløgu.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna kemur amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri september. Hon hevur vanliga sera stóran týdning fyri marknaðirnar, men hesuferð fer væntandi at vera eitt sindur øðrvísi. Óvissan viðvíkjandi ódnunum Katrinu og Ritu ger, at marknaðirnir ikki fara at taka eina vánaliga frágreiðing so tungt. Sjóneykan verður sett á álitistøl og eitt tíðindaskriv frá evropiska miðbankanum.

Donsk 10-ára renta




Vísital fyri norrøn partabrøv




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 620,53 | 0,1% | ↑ |
| JPY | 5,47 | -0,7% | ↓ |
| GBP | 1.094,78 | -0,5% | ↓ |
| NOK | 94,78 | -0,9% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,85 | -0,3% | ↓ |
| Evru Lánsbrøv | 175,82 | -0,7% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 103,37 | 2,4% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 68,98 | 2,7% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*